Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo





Hjúnini Bert og Catharina Öhman við sínum Saab 900 kampingbili, sum tey hava ferðast við kring um í heiminum

VIÐ KAMPING-BILI Í 50 LONDUM

Í síðstu viku vóru eini svensk hjún í Føroyum, sum hava ferðast kring um í heiminum við sínum Saab 900 kampingbili

Hjúnini Catharina og Bert Öhman úr Svøríki hava síðan 2005 ferðast í umleið 50 londum kring heimin í sínum Saab 900 kampingbili.

Hon arbeiddi sum konsulentur í marketing og kommunikatión, og hann sum PC-supportari í eini teldufyritøku, áðrenn tey tóku stig til at ferðast kring heimin við bili sínum. Tey vóru í Føroyum í síðstu viku á veg til Íslands.

Bilurin hjá teimum er ein Saab 900 árgang 1992 við Toppola kampinghúsi omaná. Toppola var ein svensk verksmiðja, sum spesialiseraði seg í at gera sonevndar autocamparar til Saab. Hetta verður gjørt við at taka baklúkuna av bilinum og seta kampinghúsið omaná.

Í kampinghúsinum er ein dupultsong oman á takinum og aftanfyri er t.d. vask, køliskáp og gasskomfýrur.

Catharina og Bert siga at tey ongantíð havt mekaniskar ella tekniskar trupulleikar av týdningi, hóast bilurin hevur koyrt umleið 300.000 kilometrar. Men meðan tey vóru í Føroyum hendi eitt brek við motorinum, sum gjørdi at tey ikki kundu koyra við bilinum. Tey koyrdu eftir Oyggjarvegnum, tá óhappið hendi, so tey steðgaðu við fyrstu bilasøluna, tey komu til, sum var Norðbil. Har vórðu tey væl móttikin og vegleidd til Auto Service, sum umboðar Saab í Føroyum.

Hjúnini vóru væl nøgd við hjálpina tey fingu í Føroyum, so tey kundu halda leiðina fram víðari til Íslands. Á heimasíðuni www.dreamtrip.se eru myndir og ferðafrágreiðingar frá øllum londunum sum tey hava vitjað.